## Samba-dansur og dystur

**Fótbóltur:** Tey fótbóltshugaðu verða ikki við sviðusoð á stevnuni. Tey kunnu m.a. síggja fram til ein forvitnisligan dyst millum tvey av gomlu liðunum í føroyskum fótbólti.

Leygardagin kl. 17 fara nevniliga Vágaliðið og B68 av Toftum at leika steypadyst. Fótbólturin er so eitt, men í steðginum verður eisini eitt serligt slag av undirhaldi.

Nógvir brasilianarar eru so líðandi komnir við í føroyskan fótbólt, og í steðginum er ætlanin at vísa fram sambadans.

Aftaná dystin fer Frits Witt at handa steyp og heiðursmerki.

## Borgarstjórar tala

**Samkomur:** Vestanstevnan verður sett sum siður er leygardagin kl. 14.

Í sambandi við hetta verður eisini ein skrúðgonga við ítróttarfólki, skótum og reiðfólki, sum fara at ganga frá Ellisheiminum og inn á økið undir kommunuskrivstovuni.

Her verður stevnan sett av borgarstjóranum, Napoleon Magnussen. Hornorkestrið fer eisini at spæla við hetta høvið.

Um midnáttarleitið verður eisini serstøk samkoma, har ein annar borgarstjóri, Dánjal Andreasen úr Leirvík fer at halda røðu. Umframt røðuna, verður eisini felagssangur og fýrverkarí á skránni hesa løtuna.

## Ein lykil fyri eina súkklu

**Lutaseðlar:** Hesa seinastu tíðina hevur eitt av evnunum í tosinum manna millum verið kappingin um súkkluna. Her er talan um eitt serligt slag av lutaseðlum, hvørs vinningur er ein súkkla. Í staðin fyri lutaseðil keypir ein ein lykil, sum hóskar til hesa súkkluna.

Sunnukvøldið millum kl. 18 og 21 verður so høvið hjá fólki at finna fram til, hvør er tann hepni eigarin av tí lyklinum, sum passar til súkkluna. Hesin er samstundis vinnari av súkkluni og kann súkkla á henni frá Bygdarskúlanum og heim til hús.

# Nýtt modell av Nýggjabergi

**Í forkirkjuni í Miðvágs kirkju ber til at síggja eitt nýtt modell av skipinum, sum fórst í mars mánaði 1942.**

FRAMSÝNING
*Snorri Brend*

**Miðvágur:** Tað er ikki ofta, at ein framsýning letur upp í Miðvágs kirkju. Men sunnudagin fáa vestanstevnugestir høvið at vitja kirkjuna, har eitt nýtt modell av Nýggjabergi verður sýnt fram.

Tað er Petur Hans Poulsen í Havn, sum hevur gjørt hetta modellið. Hann er sonur ein av manningini, ið fórst við skipinum í 1942 – tann 36 ára gamla stýrimannin, Hans Poulsen úr Havn.

Modellið av skipinum er sett í vakurt glasbúr, har ein eisini hevur fingið til vega nøvn og myndir av øllum 21 monnunum, sum fórust við skipinum.

Miðvágs kirkja er opin sunnudagin millum kl. 18 og 20.



*90 ára gamli miðvingurin, Karl Joensen skuldi verið við Nýggjabergi. Ein annar maður bað um hansara tjans umborð. Hesin fórst saman við 20 øðrum monnum, harav 16 teirra vóru úr Miðvági. Nú ber til at síggja hetta modellið av Nýggjabergi í Miðvágs kirkju*



*- Eg skuldi verið við Nýggjabergi ..., sigur Karl Joensen, fáorðaður*

# - Tað var ikki gott vorðið

**- Tá "Nýggjaberg" fórst ávirkaði tað bygdarlívið sera nógv. Øll vóru kedd, sigur 90 ára gamli miðvingurin, Karl Joensen. Sjálvur kundi hann verið við hesum skipinum, sum ikki kom aftur av Suðurlandinum í mars mánaði 1942.**

MINNISLØTA
*Snorri Brend*
*Mynd: Bárður*

**Miðvágur:** - Nei, tað var illa statt her í bygdini, tá tað fræddist at Nýggjaberg var farin.

- Hetta vóru ikki góð tíðindi, sigur Karl Joensen, sum misti ein beiggja við skipinum.

Sjálvur skuldi Karl havt verið við á hesum vanlukkuliga túri. Men ein annar maður, sum hann kendi, spurdi um hann ikki kundi sleppa við í hansara stað.

- Eg gav honum – hesum familjumanninum - so loyvi til hetta.

- Og hann, sum bara skuldi vera við henda eina túrin ..., sigur Karl, fáorðaður.

Nýggjaberg fór til fiskiskap undir Íslandi, men tað hoyrdist einki frá honum aftur. Og sambært bókini "Stríðsárini 4" varð skipið søkt av týska kavbátinum U701 hin 7. mars 1942.

### Stórstoytir

Hesi fyrstu krígsárini vóru baldrut og trupul hjá føroyskum fiskiførum.

Í bókini "Víkingasynir" greiðir J. Joensen soleiðis frá um hesi árini undir yvirskriftini "Stórstoytir":

- Royndarárið mikla, 1941, gekk út. Føroyar høvdu mist tað størsta skipatal, tær á nøkrum sinni hava mist eftir einum ári, og fólkaskaðin var líka so stórur sum eitt árið, tá verst vildi til í friðartíð, og tá ið hugsað verður um, hvussu nógv skip, ið fórust, kundi, um illa vildi til, fólkaskaðin verði so nógv størri.

522 ferðir gjørdu tey føroysku skipini til Bretland í 1941, 29.137 tons av fiski var farmur teirra, og fingu teir um 40 mill. fyri henda fisk.

1942 varð hildið fram við siglingini við sama lag; hetta árið gjørdu føroysk skip 528 ferðir til Bretlands við fiski. Vektin var 33.262 tons, og hesin fiskur varð seldur fyri um 43 mill. kr. Men hetta var eisini Føroyum eitt dýrt ár; skipamissurin var meinur og fólkaskaðin stórur.

Ein lætti var tað, at flúgvaraálopini gjørdust ótættari; men tey vóru mein; tí av kríggsávum og ætlaðum kríggsávum mistu Føroyar í 1942 6 skip, og við teimum trimum av hesum skipum fórst so nógv fólk, at hvør missur fyri seg rakti so víða og tók so dygt. "Vesturfarið" og "Nýggjaberg" hvurvu, og av manningini á "Tór II", sum varð søktur við torpedo, komu ikki fleiri enn 3 aftur.

- Stoytirnir vóru størri, raktu størri tal av fólki og nívdu meira meint, stendur altso skrivað í Víkingasynum.

### Einkjur kring alt landið

Í bókarøðini "Stríðsárini" greiðir N. J. Arge meiri nágreiniligt frá tilburðinum, tá Nýggjaberg varð søktur av týska kavbátinum U701.

Hetta er ein sera áhugaverd frásøgn, sum m.a. byggir á dagbøkurnar hjá skiparanum umborð á kavbátinum, Horst Degen. Her sæst, at Nýggjaberg varð søktur undir Íslandi hin 7. mars 1942 kl. 23:15. Her vísir høvundurin eisini á støðuna í landi, og hvussu meint hetta rakti Miðvág og onnur støð í landinum.

Í Miðvági sótu átta einkjur eftir við 32 børnum. Í Vestmanna ein einkja við seks børnum. Í Vági ein einkja við sjey børnum. Í Havn ein einkja við fýra børnum, meðan skiparin Mortan Mortensen á Argjum átti 12 børn, sum øll vóru tilkomin.

## FAKTA

**Hesir fórust við Nýggjabergi**

Tá Nýggjaberg varð søktur í mars mánaði 1942 vóru hesir menn við skipinum, sambært bókini Víkingasynir:

M. J. Mortensen, Argir, 58 ár, skipari; Hans Poulsen, Tórshavn, 36 ár, stýrimaður; Julius Thomsen, Miðvág, 26 ár, stýrimaður; T. S. Zachariassen, Vestmanna, 28 ár, maskinmeistari; Samuel Joensen, Miðvág, 23 ár, maskinmeistari; Jens Jacob Hansen, Miðvág, 35 ár, kokkur; Johannes Ellefsen, Miðvág, 28 ár; Esmar E. Poulsen, Miðvág, 28 ár; Hans Jørgensen, Miðvág, 25 ár; Poul Magnussen, Vágur, 42 ár; J.H. Johannesen, Miðvág, 46 ár; Theodor Hansen, Miðvág, 24 ár; Ludvig Poulsen, Miðvág, 48 ár; Hjalmar Reynstind, Miðvág, 39 ár; Niclas Niclasen, Miðvág, 44 ár; I.A. Richard á Ryggi, Miðvág, 28 ár; Evald Niclasen, Miðvág, 27 ár; Hjalmar Johansen, Miðvág, 29 ár; Aksel Niclasen, Miðvág, 43 ár; Niels J. Nattestad, Miðvág, 52 ár, og Niels Jacob Nielsen, Sandavág, 19 ár.